# Slangan heldur Guðrun burturi frá tindinum

**Guðrun Sólja Jacobsen er aftur hesa vikuna nummar 2 á almenna danska hitlistanum yvir fløguútgávur. Big Fat Snake situr á ovasta rók**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Fløgan hjá Guðrun Sólju Jacobsen liggur aftur hesa vikuna sum nummar 2 á almenna danska hitlistanum.

»Quiet Storm«, sum útgávan kallast, kom beinleiðis inn sum nummar tvey í síðstu viku. Tá var mett, at Guðrun skuldi havt møguleika at enda heilt á toppinum hesa vikuna, men tað vísir seg, at rockbólkurin Big Fat Snake er drúgvur á listanum.

Fløgan »One Night of Sin« hjá bólkinum er aðru vikuna á rað nummar 1 á listanum, sum byggir á sølutølini í plátubúðunum.

Og tí má Guðrun lata seg noyða við næstfremsta plássið á listanum, men tað er nú heldur ikki tað ringasta.

Hon liggur í øllum førum frammanfyri nøvn sum Robbie Williams, Justin Timberlake og Shubidua.



*Guðrun Sólja Jacobsen stríðist við Big Fat Snake á danska tónatindinum*

## Terji í Fuglafirði



Fríggjakvøldið fer Terji Rasmussen at spæla til dans í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Terji fer at syngja kendar sangir hjá sær og øðrum, og hann fer á pallin saman við nøkrum royndum tónleikarum.

Kim Hansen, Hjalti Joensen, Arnold Ludvig og Rógvi á Rógvu spæla undir.

## Karoke í Hvalba

Nú verður skipað fyri karoke-kvøldum, har fólk sleppa at syngja eina góðan á pallinum. Valið stendur millum kendar sangir hjá kendum tónleikarum.

Stórskíggi verður sett upp til tiltøkini, og so er tað næstan sum at vera ordilig poppstjørna.

Fyrsta tiltakið av hesum slagnum verður í Roynhøllini í Hvalba leygarkvøldið 6. september kl. 23.00.









